Hópur av fólki heilsaðu Hansu Mariu:

# – Tað er ein æra at eiga skip sum skapa trivna og virksemi

**- Tá ið vindur fer at blæsa, og aldurnar reisast, eri eg fullvísir í, at sjómaðurin mangan hevur kent seg lítlan. Mangir eru teir, sum hava boygt síni troyttu knø og takkað honum, sum øllum valdar fyri, at teir vunnu upp land. Hetta eru treytirnar, tá ið tú søkir sjógvin. Men við áræði verður aftur lagt út á hav, segði Símun Johannesen, borgarstjóri í Nes kommunu, tá ið nýbygningurin, Hansa Maria, hevði lagt til bryggju á Toftum í góðveðrinum mánakvøldið**



*Í góðveðrinum mánakvøldið verður lagt til bryggju. Nógv fólk tekur ímóti, og Nes kommuna skipar fyri hátíðarligari móttøku*

Mynd: Vilmund Jacobsen

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nógv fólk høvdu leitað sær oman á Toftagjógv mánakvøldið, tá ið nýggi trolbáturin, Hansa Maria hjá Hans Andriasi Poulsen, stevndi inn um pierin á Toftum.

Hátíðarligur hornatónleikur ljómaði, meðan fólk bíðaðu spent eftir at síggja nýbygningin, sum er hin fyrsti á Toftum í fleiri ár. Onnur skip eru komin til bygdar seinastu árini, men hetta er skip, sum hava nøkur ár á baki. Seinasta skipið undan Hansu Mariu, sum menn hava lagt rygg til at keypa, er trolbáturin, Randi hjá Jens Jacob Olsen, sum er keyptur úr Danmark og umbygdur til trolvinnu.

Við hátíðarløtuna á Toftum sungu eisini kirkjukórið og sangkórið.

Alfred Olsen, kommunuskrivari, greiddi frá, hvussu Nes kommuna, sum stóð fyri móttøkuni, hevði skipað tiltakið, og røðari við løtuna í góðveðrinum mánakvøldið var borgarstjórin, Símun Johannesen.

Eftir at borgarstjórin hevði hildið sína røðu, takkaði eigarin av nýggja og snotuliga skipinum fyri stórfingnu og hátíðarligu móttøkuna og beyð øllum vælkomnum umborð at síggja skipið.



*Eigarin, Hans Andrias Poulsen, takkar fyri stórfingna móttøku og bjóðar øllum umborð at síggja skipið. Kvinnan í myrka frakkanum, Kristianna, er mamma skipaeigaran*

Mynd: Vilmund Jacobsen

## Flagg og flaggstríð

Símun Johannesen nýtti í sínari røðu høvi til at siga nøkur orð um flaggið, nú nýggja skipið júst kom til bygdar flaggdagin, 25. apríl.

- Í dag eru øll fløgg vundin á stong – ikki bara her við Toftagjógv, tí vit hava fingið eitt nýtt skip, men fløggini veittra um alt landið, nú flaggdagur er.

Borgarstjórin vísti á, at tað í ár eru liðin 65 ár, síðan føroyska flaggið varð góðkent sum okkara tjóðarmerki.

- Flestu av okkum hava helst hoyrt ella lisið um, tá ið vestmenningurin, Jákup Kristoffersen, stevndi inn á Havnina við skipi sínum, sluppini Neptun – við føroyska flagginum í húnar hátt. Hetta var, meðan flaggstríðið var upp á tað harðasta og ikki var loyvt at nýta føroyska flaggið.

Hann segði, at tá ið týskarar høvdu hersett Danmark, og Føroyar komu undir bretskt vald í apríl 1940, sluppu føroysk skip ikki longur at sigla við donskum flaggi. Tá gjørdu bretar ikki matari enn, at teir kravdu føroyska flaggið málið á skipssíðuna, áðrenn tey sluppu útaftur úr bretskari havn, har meginparturin av føroyska flotanum sigldi við fiski.

- Tað eru fólk ímillum okkum her í dag, sum upplivdu og minnast hesa tíð, men flestu av okkum hava bert sæð myndir av skipum við føroyska flagginum málað á skipsíðuna.

Borgarstjórin helt fyri, at nógv er broytt hesi mongu ár síðan flaggstríðið.

- Tað er ein frægd at síggja hetta stásiliga far liggja flaggskrýtt – við Merkinum um krosstræið saman við alskyns signalfløggum yvir øllum skipinum.

## Æra at eiga skip

- Áræði og framfýsni hevur sermerkt fólkið her í økinum, og hetta er ikki minst galdandi, tá ið ræður um okkara sjófólk. Tað er til gleði og sóma fyri alt fólkið, ið her býr, at vit eiga fólk við áræði og visjónum. Mong eru tey, sum gjøgnum tíðirnar hava staðið her á Toftagjógv og heilsað skipum vælkomnum.

Símun vísti á, at ofta hoyrir tú menn standa og práta um skip, fiskiskap, fiskirættindi og slíkt.

- Tað, sum altíð gongur sum ein reyður tráður í hesum práti, er, at vit mugu ansa væl eftir okkara rættindum og loyvum, so tey vera verandi á plássinum. Hesum úttalilsum, sum koma frá okkara vinnulívi, havi eg alstóra virðing fyri.

Hann helt fyri, at hyggja vit rundan um okkum – ja, so er tað sjógvurin og fiskurin, sum er grundarlagið fyri tí vøkstri, sum her hevur verið.

- Tað er gleðiligt at hoyra, at menn taka bygdirnar við í sínum metingum, um teir skulu halda fram ella ikki. Teir kenna tað sum eina æru at eiga skip og vera við til at skapa tann trivna og tað virksemi, sum vit øll nýta so nógv gott av. Hetta fegnast vit um og eru teimum takksom fyri, segði borgarstjórin.

Og hann helt fram:

- Vit standa her í dag og heilsa Hansu Mariu vælkomnari, men tað er ikki meira enn tríggir mánaðir síðan, vit seinast stóðu her og sóu trolbátin, Randi hjá Jens Jacob Olsen, leggja til bryggju fyri fyrstu ferð. Aðrar ætlanir eru eisini í umbúna hjá okkara framfýsna fólki. Tað er hugaligt hjá okkum øllum at síggja hetta stásiliga far, sum nú skjótt skal riggast til við trolum, weirum og lemmum - og vera karmur um eitt nútímans arbeiðspláss á havinum.

## At vinna upp land…

Borgarstjórin helt fram við orðunum, "Conquerors of the seas" ella "Havets erobrere".

- Hesi orðini hava verið at sæð, eitt nú í lýsingum hjá teimum stóru reiðaríunum, tá ið søkt hevur verið eftir aspirantum at útbúgva seg á sjónum. Sjálvur havi eg ongantíð kunnað tikið undir við hesi útsøgn, tí eitt vita vit øll; at vinna á havinum er ikki nakað, man bara ger. Til tess er neyðugt við skynsemi og góðum sjómansskapi. Tá ið vindur fer at blæsa, og aldurnar reisast, eri eg fullvísur í, at sjómaðurin mangan hevur kent seg lítlan. Líka so fullvísur eri eg í, at mangir av okkara sjómonnum onkuntíð í lívinum hava boygt síni troyttu knø og takkað honum, sum øllum valdar fyri, at teir vunnu upp land. Hetta eru treytirnar, og tað vita allir, sum hava søkt sjógvin. Men við áræði verður aftur lagt út á hav, tí livast má – og sum vælkenda orðatakið sigur, at – siglast má - !

At enda ynskti borgarstjórin eigaranum og manning hansara hjartaliga tilllukku við nýggja skipinum.

- Vegna kommununa og fólkið, sum her býr, ynski eg, at hann, sum øllum valdar, má verða við á ferðini, og at eydnan verður við skipi og manning. Við hesum orðum heilsa vit Hansu Mariu vækomnari til bygdar, segði Símun Johannesen.

Seinastur at taka orðið við móttøkuna á Toftagjógv, var eigarin, Hans Andrias Poulsen, sum beyð øllum vælkomnum umborð at síggja skipið, og somuleiðis beyð hann øllum niðan á Svangaskarð til ábit.